Bert ein føroysk fosturtøka í Danmark frá 1999-2002

Afturvendandi ákærurnar um, at føroyskar kvinnur í hópatali fara til Danmarkar at fáa fosturtøku, eru nú greitt afturvístar

FOSTURTØKA
Eydna Skaale

Talið av fosturtøkum í Føroyum liggur um 50-60 árliga. Hetta talið verður tó skirt at vera ein ósonn mynd av, hvussu nógvar føroyskar kvinnur veruliga taka fosturtøku. Eitt av høvuðsargumentunum ímóti núverandi lóg er, at hon er dupultmoralsk. Hon heldur føroyska fosturtøkutalinum niðri á einum lágum, penum tali, samstundis sum føroyskar kvinnur í hópatali fara niður og fáa fosturtøku framda har, um tær eftir føroysku lógini fáa nei til ynskta fosturtøku.

Naser Khader, sum við spurningi sínum um føroyskar fosturtøkur helst ætlaði at avdúka føroyskan dupultmoral, má nú staðfesta, at hald ikki er í hansara ákærum

Mynd: Liselotte Sabroe

Spurningur um føroyskar fosturtøkur í DK

Stutt fyri jól setti fólkatingslimurin fyri Radikale Venstre, Naser Khader, veruliga eld í kjakið, tá hann vildi broyta føroysku lógina til at verða eins og ta donsku, t.v.s, at fosturtøkan skal verða frí. 10. februar í ár setti sami Naser Khader fram spurning til innanríkis- og heilsumálarádharran, Lars Løkke Rasmussen, og bað hann kanna hvussu nógvar føroyskar kvinnur árliga fara til Danmarkar at fáa fosturtøku framda. Hann vildi eisini fegin síggja statistikk yvir tølini. Spurningurin var soljóðandi:

»Kan ministeren oplyse, hvor mange færøske kvinder der årligt får foretaget abort i Danmark, og vil ministeren tage intiativ til en statistisk opgørelse, såfremt en sådan ikke allerede foreligger?«

Grundgevingin til spurningin var, at hann vildi hava veruliga talið á føroyskum fosturtøkum fram. Við núverandi skipan sæst ikki hvussu átroðkandi tað er við eini liberalisering av lógini, tí so nógvar kvinnur velja at fara til Danmarkar. Tað er alneyðugt at fáa staðfest um føroyska lógin virkar fyribyrgjandi ella um hon bert er sum ein slúsa til donsk sjúkrahús.

Men um Naser Khader við spurningi sínum ætlaði at avdúka føroyskan dupultmoral, royndist tad ein veruligur boomerangur.

Eittans dømi

Skrivliga svarið frá Lars Løkke Rasmussen, sum kom týsdagin 24.februar, tekur fullkomiliga grundarlagið undan ákærunum um, at føroyingar eru dupultmoralskir í fosturtøkuspurninginum, tí vit lata okkara fosturtøkur koma upp í danska statistikkin. Heilsumálaráðharrin staðfestir nevniliga, at í tíðarskeiðnum 1999-2002 var bert ein føroysk kvinna skrásett at hava fingið fosturtøku framda í Danmark:

»Der synes ikke at være tale om, at færøske kvinder i større tal tager til Danmark for at få foretaget abort. En trækning fra Landspatientregisteret viser således, at der i den fire-årige periode 1999-2002 kun var én kvinde med bopælsamt på Færøerne, som fik foretaget abort i Danmark.«

Henda staðfesting ger veruliga høvuðsargumentið móti galdandi skipan til einkis. Tað er við hesum staðfest, at lógin ikki er ein slúsa sum sendir føroyskar kvinnur til Danmarkar.

Heilsumálaráðharrin tekur kortini eitt fyrivarni, tá hann sigur, at »Der synes ikke at være tale om«. Orsøkin til hetta fyrivarni kann hugsast at vera, at nakrar føroyskar kvinnur flyta til Danmarkar, áðrenn fosturtøkan verður framd. Gera tær tað, koma tær ikki í statistikkin sum føroyingar, men sum danir.

Vit hava tí vent okkum til Turid Holm, serlækna, og biðið hana meta um, hvør orsøkin er til, at næstan eingin føroysk kvinna tykist fara til Danmarkar at fáa fosturtøku.

Turið Holm, serlækni á Landssjúkrahúsinum:

Vit nokta nærum ongum at fáa fosturtøku í Føroyum

Føroyska lógin er ikki so stirvin, at tað er neyðugt hjá føroyskum kvinnum at fara niður at fáa fosturtøku. Tískil eru tølini so lág

FOSTURTØKA
Eydna Skaale

Svarið, sum danski innanríkis- og heilsumálaráðharrin gav Naser Kahder, kemur ikki óvart á Turið Holm, serlækna.

– Vit nokta nærum ongum at fáa fosturtøku framda á Landssjúkrahúsinum, so eg dugi ikki at síggja, hví so nógvar føroyskar kvinnur skuldu farið niður at fingið fosturtøku framda. Einasta orsøkin kundi verið, at tær ikki ynskja at hava eina fosturtøku nevnda í føroysku pappírunum, sigur hon.

Tær flestu flyta adressu

Hon sigur víðari, at tað verður ógvuliga ringt at finna nøkur hagtøl fyri tær fáu føroysku kvinnurnar, sum velja at fara niður, tí tær flestu flyta bústað á pappírinum í nakrar dagar, so tær koma undir hagtølini sum danskarar.

– Lógin er broytt fyri stuttari tíð síðani, men inntil heilt nýliga hevur tað verið soleiðis, at um tú kom sum føroyingur, t. v. s. við føroyskari adressu, so noyddist tú at fara á eina privatklinikk og gjalda alt sjálv. Tú fekk eina rokning aftaná, og hon var avgjørt ikki bílig, sigur Turið.

Fyri at sleppa undan at gjalda, hava tær flestu sum eru farnar niður tí valt at gerast danskarar í nakrar dagar.

Og sjálvsagt koma tær tá í hagtølini sum verandi danir.

Nærum eingin fær nei

Turið sigur, at talið á fosturtøkum her á landið liggur um 60 árliga. Tað er talið á nærum øllum kvinnunum, sum ynskja fosturtøku. Hon sigur tað vera reinar gitingar, sum t.d. Naser Khader hevur fört fram, um alla rúgvuna av føroyskum kvinnum, sum fella uttan fyri strongu føroysku fosturtøkulógina og fara til Danmarkar. Tað er ikki so dupultmoralskt.

– Hatta eru bara gitingar. Eg dugi ikki at síggja, hví nøkur kvinna skuldi farið ígjøgnum alt stríðið við at skifta adressu og fara niður til eina fosturtøku, tá hon kann gera tað her, sigur Turið.

– Nakrar heilt fáar verða kanska steðgaðar hjá kommunulæknunum, tað er møguligt. Og tær fara kanska niður at taka fosturtøku. Men tað er eitt lítið mál at halda fast í. Tað er avgjørt ikki vanligt, at føroyskar kvinnur fara niður, staðfestir Turið Holm t enda.

Friðarligt vikuskifti

LØGREGLUTÍÐINDI
Rúna Sivertsen
runa@sosialurin.fo

Tað hevur verið stak friðarligt í vikuskiftinum, frætta vit frá løgreglustøðunum kring landið

Hetta vikuskiftið var eitt av teimum friðarligu hjá løgregluni. Tó var nakað av húsaófriði, rúsdrekkakoyring og nøkur ferðsluóhapp.

Eitt veitluslag í Klaksvík endaði við, at fólk fóru til hendurs, og tað gekk so útyvir møblarnar, sum fingu nakað harða viðferð og brotnaðu.

Nøkur ferðsluóhapp hava verið, sum tíbetur bert hava kostað materiellan skaða. nakrir eru tiknir fyri at hava koyrt við kenning, men tíbetur heldur ikki har hendi nakar mansskaði.

ítróttur

Nr. 42 • týsdagur • 2. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Ein ótrúligur møguleiki

Landsliðsleikarin Jákup á Borg er sera spentur upp á at fara í gongd við tíðina sum yrkisleikari í danska superligafelagnum OB

SUPERLIGA
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

So fekk enn ein føroyingur høvi at royna seg í superligaini. Landsliðsleikarin Jákup á Borg fer í morgin av landinum til Danmarkar, har hann næstu tríggjar mánaðirnar skal royna seg í danska superligafelagnum OB úr Odense.

føroyski landsliðsleikarin Jákup á Borg fær nú at høvi at royna seg í bestu donsku deildini næstu tríggjar mánaðirnar, eftir at HB og danska felagið OB gjørdu leigusáttmála um vikuskiftið

Gekk ótrúliga skjótt

Jákup á Borg er sum vera man ógvuliga fegin um at hava fingið møguleikan at koma til eitt superligafelag. Hann dylur ikki fyri, at tað er ein ótrúligur møguleiki, og samstundis eitt stórt fet á veg móti tí stóra dreyminum um um burturav at gerast yrkisleikari uttanlands.

Áheitanin frá OB um at leiga føroyska landsliðsleikaran kom leygarmorgunin, so neyðugt var at gera skjótt av, tí flytingarvindeygað stongdi á midnátt sunnukvøldið. Tað var Jákup í Stórustovu, ið er umboðsmaður hjá Jákupi á Borg, ið fekk áheitanina frá danska felagnum. Hann boðaði beinan vegin felagnum hjá Jákupi á Borg, Havnar Bóltfelag, frá fyrispurninginum, og so gekk alt sera skjótt fyri seg, greiðir Jákup á Borg frá. Í sama viðfangi leggur Jákup afturat, at hann fegin vil nýta høvið til at takka bæði HB og arbeiðsgevara sínum, Føroya Bjór, fyri stóra vælvild. Allir partar vóru ótrúliga positivir, og hetta gjørdi sjálvsagt sítt til, at tað var møguligt at fáa avgreitt leigusáttmálan so skjótt.

Tað er ikki av tilvild, at OB leigar júst Jákup á Borg, tí fyri einum ári síðani var hann til royndarvenjingar í danska felagnum. Tað gekk eisini væl, men tá hevði OB ein rættuliga breiðan hóp, og mett var, at tørvur var ikki á enn einum vongspælara. Men Jákup hevði staðið seg væl undir royndarvenjingini, og tí var hann ikki gloymdur.

Fingið góð ráð frá Heine Fernandez

Sjálvur ivaðist Jákup á Borg ikki, tá ið hann fekk tilboðið frá OB, og hann er ógvuliga spentur upp á avbjóðingina. Jákup ráðførdi seg við danska venjaran hjá HB, Heine Fernandez, og tað hjálpti mær nógv, sigur Jákup á Borg. Heine Fernandez var sjálvsagt harmur um at missa Jákup í tríggjar mánaðar, men hann stuðlaði samstundis Jákupi í avgerð síni.

Heine Fernandez ávaraði eisini Jákup um, at tað kann verða trupult at koma til eitt felag sum leiguspælari. Sum leiguspælari skalt tú gera tað ótrúliga gott fyri at koma á liðið, tí ein venjari vil altíð taka spælarar, ið eru bundnir at felagnum í longri tíð, fram um spælarar, ið eru leigaðir fyri eitt styttri tíðarskeið, var eitt av boðunu, ið Jákup fekk frá Fernandez. Feløgini vilja altíð fyrst og fremst satsa upp á tað fasta, segði danski venjarin við Jákup.

Føroyski landsliðsleikarin ásannar, at hann ikki kann vænta at sleppa beint inn á liðið hjá OB, men málið hjá honum er so at dríva á, og siggja hvussu langt tað røkkur. Danska kappingin byrjar um knappar tvær vikur, men undan hesum hevur OB tveir venjingardystir á skránni, har høvi helst verður hjá Jákupi at vísa venjaranum, Troels Bech, hvør dugur er í honum. Venjingarstøði skuldi verið á góðari leið, sigur Jákup á Borg, og venjingarlegan í Spania við landsliðnum hevur hjálpt munandi upp á bóltførleikan. Jákup hevur í vetur spælt hondbólt við H71 í bestu mansdeildini, og av teirri orsøk er hann helst betur fyri, enn nógvir av hinum føroysku leikarunum.

Ikki bangin fyri at sita á bonkinum

Royndirnar hava víst, at føroyingar í donskum felagum, hava sitið nógv á beinkinum ella verið heilt uttan fyri hópin. Dømir um hetta er Jón Rói Jacobsen í Brøndby, Johan Byrial Hansen í júst OB og Christian Høgni Jacobsen í Esbjerg. Men hesum stúrir Jákup á Borg ikki fyri. Hann heldur tað verða mennandi undir øllum umstøðum at fara avstað, og fær man ikki spælitíð í superligauni, so fær man roynt seg á eykaliðnum í danmarks-seriuni, og har er støðið eisini rættuliga høgt, metir Jákup á Borg.

Jákup á Borg er familjumaður við stórum F, og tí var neyvan nøkur avtala gjørd, um familjan ikki var við. Sum áðurnevnt fer Jákup sjálvur av landinum í morgin, meðan familjan væntandi kemur til Odense um eina viku ella so. Í fyrstuni skal Jákup búgva á gistingarhúsi í føðistaðnum hjá H.C. Andersen, men tá ið tey bæði unnustan Sussie og lítli sonurin Fríði koma niður, verður farið í íbúð, sum OB útvegar føroysku familjuni. Jákup er sum sagt sera spentur upp á avbjóðingina, og tað munnu teir allarflestu fótbóltsáhugaðu føroyingar eisini verða, og Sosialurin fer at fylgja væl við, hvussu tað gongur hjá føroyska landsliðsmanninum í OB.

Teir ungu fáa kjansin

Formaðurin í HB, Birgir Enghamar, sigur at allir partur eru væl nøgdir við avtaluna, sum er gjørd millum HB og OB um leigu av Jákupi á Borg

SUPERLIGA
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Formaðurin í HB, Birgir Enghamar, sigur ongan avloysara verða á veg til HB fyri Jákup á Borg, sum skal royna seg í donskum fótbólti næstu mánaðirnar

Allir partar eru tættir sum tunnan, tá ið spurt verður eftir figgjarligu umstøðunum í leigusáttmálanum, ið er gjørdur millum HB og OB um leigu av Jákupi á Borg. HB-formaðurin sigur, at í HB hava teir altíð havt tann politikk, at teir ikki vilja forða einum leikara í at sleppa at royna seg uttanlands. Birgir Enghamar sigur, at sjálvsagt vildu teir fegnir havt Jákup í hópinum alt kappingarárið, men teir vilja ikki forða fyri einum slíkum møguleika hjá einum spælara.

Satsa upp á teir ungu

Nú ein so markantur leikari sum Jákup á Borg ikki verður við hjá føroyameistarunum fyrstu mánaðirnar, er tað nærliggjandi at hugsa, at havnarfelagið fer at leita sær eftir einum avloysara, men tað avsannar formaðurin í HB. Birgir Enghamar sigur, at HB fer at satsa upp á sínar egnu ungu leikarar, og hetta er eitt kærkomið høvi hjá teimum ungu at vísa hvør dugur er í teimum.

Í HB fegnast teir vegna Jákup um, at tað hevur eydnast honum at fáa leigusáttmála við OB, og í 100-ára felagnum eru teir eisini ernir um, at danska superligain hevur áhuga fyri teirra leikarum. Birgir Enghamar sigur, at allt pappírsarbeiðið viðvíkjandi spæliloyvinum hjá Jákupi gekk ótrúliga skjótt fyri seg, og at ein avtala er gjørd, sum allir partar eru nøgdir við.